Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

# Hulk

Á Canal+ Film1 í kvøld kl. 20.00



Grøna hetjan Hulk

Við Eric Bana, Jennifer Connelly, Sam Elliott, Nick Nolte
Leikstjórnað: Ang Lee
Aktións/sci-fi filmur,
132 min.

Søgan um ta grønu hetjuna Hulk fevnir seg yvir 30 ár í hesum filminum. Byrjað verður fyrst í 60´unum. Á eini loyniligari amerikanskari hernaðarstøð verða kanningar gjørdar við gammastrálum. Vísindamaðurin David Banner arbeiðir á hesi hernaðarstøðini. Ovastin á granskingarstovuni vil ikki geva loyvi til at royna gammastrálur á menniskju. Men tann ovurhonds ágrýtni Banner gongur ímóti ordrum og nýtir sín egna kropp til at gera royndir við gammastrálunum. Úrslitið er at hann gerst hálvsvakur og arvamassi hansara verður broyttur. Stutt eftir er kona hansara við barn og eigir ein drong. Banner gerst greiður yvir, at sonurin allarhelst hevur arvað broytingarnar. Men ein dagin verða tær royndirnar, ið Banner hevur gjørt á hernaðarstøðini uppdagaðar. Hann spreingir hern-aðarstøðina í luftina og flýggjar. Sonurin, Bruce Banner, verður adopteraður. 25 ár seinni arbeiðir tann ungi Banner við tí sama sum pápi hansara. Hann er eisini vísindamaður og arbeiðir við gammastrálum. Men hann er úti fyri einum óhappi í arbeiði sínum og fær eina lívshættisliga mongd av gammastrálum á seg. Nú verða tær arvafrøðisligu broytingarnar, ið hann hevur arvað frá pápanum, settar at virka. Úrslitið av hesum er ræðandi!



Bruce Banner verður raktur av gammastrálum...



... og úrslitið er ræðandi!

# Rúmdarferðin ár 2001

Á TCM leygarkvøldið kl. 20.00



*Meistaraverkið "Rúmdarferðin ár 2001" frá 1968, leikstjórnaðað hevur Stanley Kubrick*

Við Gary Lockwood, Keir Dullea, Daniel Richter, William Sylvester
Leikstjórnað: Stanley Kubrick
Sci-fi filmur frá 1968,
160 min.
Upprunaheiti: 2001 - A Space Odyssey

Uttan iva eitt av meistaraverkunum á løriftunum í 60´unum eftir tann nógv umtalaða leikstjóran Stanley Kubrick. Filmurin er ein stórsligin søga um menniskjað og umhvørvið tess. Í filminum verður byrjað fyri umleið fýra milliónum árum síðan, tá mannapan gerst greið yvir at nýta reiðskap og vápn. Milliónir av árum seinni, kemur vísindamaðurin Floyd til Mánan, her skal hann kanna nærri eina gátufulla steinsúlu. Hendan súlan sendir boð ímóti Jupiter. Nøkur ár seinni í 2001 verður stóra rúmdarfarið Discovery sent við kós ímóti Jupiter. Umborð eru rúmdarmenninir Bowman og Poole, afturat teimum eru tríggir niðurfrystir starvsfelagar og so tann nýliga framleidda teldan HAL. Men kunna teir líta á telduna?



*Ein stórsligin søga um menniskjað og umhvørvið tess*



FILMSTEIGURIN

# Bridget Jones – næstan skilagóð

Æviga singlan, Bridget Jones, er ikki støk meira. Karrieru-hugsandi kaloriuteljarin hevur í seks vikur hildið saman við dugnaliga advokatinum Mark Darcy, og einki tykist kunna steðga teirra eydnu.

Sjálvt byrjar Bridget tó knappliga at seta sær sjálvum spurningar, og so fer hon at hugsa. Bæði at Mark kanska fer at seta *stóra* spurningin, ella hevur hann kanska eina aðra?

Óttin og ivin fær sjálvandi Bridget at leita ráð hjá gomlu vinum sínum, og tey vita sjálvandi altíð, hvat tað merkir, tá Mark hevur sagt soleiðis og soleiðis.

Men hvat nú, um tey ikki duga at tulka Mark. Og hvat, um hetta fær Bridget til at misfata sjeikin enn meira, enn neyðugt? Sjálvsagt viðførir hetta hópin av stuttligum støðum, og so er spurningurin, hvussu ólukkan Bridget skal rekja seg úr øllum fløkjunum.

Í høvuðsleiklutunum síggja vit her Renée Zellweger, Hugh Grant og Colin Firth.





# Alien Vs. Predator

Milliarderurin Charles Bishop Weyland roynir at savna sær eitt lið, sum er samantvinnað av teimum bestu altjóða fornfrøðingunum, granskarunum og trygdarserfrøðingunum. Á odda fyri hesum stendur Alexa Woods, sum skal kanna ein merkisverdan hita, sum kemur úr Antarktis. 600 metrar undir havsins flatu, finna tey eina pyramidu, sum líkist eini samanblanding av aztekiskum, egyptiskum og cambodianskum kulturi. Innan í pyramiduni er eitt hátøknifrøðiligt net av kømurum. Hetta kann ikki vera mannaskapt, og øll eru tey samd um, at her er talan um rúmdarverur.

Og brádliga koma tey fram á sannleikan. Predatorar hava fangað og innilokað ein Alien-drotning, sum hvørt 100. ár leggur egg. Fyri at prógva manndóm sín, verða ungu predator-krígsmenninir settir at berjast móti ynglinum frá drotningini. Granskingarliðið er brádliga miðdepil í einum ófatiligum offur-rituali og kríggi millum tvey sløg av rúmdarverum.





Frumsýning
Fríggjadagin 19.11. kl. $19^{00}$
Fríggjadagin 19.11. kl. $23^{00}$
Leygardagin 20.11. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 21.11. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 21.11. kl. $22^{30}$
Fríggjadagin 19.11. kl. $21^{15}$
Leygardagin 20.11. kl. $19^{00}$
Leygardagin 20.11. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 21.11. kl. $20^{45}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Frumsýning
Fríggjadagin 19.11. kl. $20^{30}$
Leygardagin 20.11. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 21.11. kl. $20^{00}$
Fríggjadagin 19.11. kl. $23^{30}$
Leygardagin 20.11. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 21.11. kl. $23^{00}$




Fríggjadagin 19.11. kl. $16^{30}$
Leygardagin 20.11. kl. $16^{30}$
Sunnudagin 21.11. kl. $16^{00}$




Fríggjadagin 19.11. kl. $18^{00}$
Leygardagin 20.11. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 21.11. kl. $17^{30}$

KOMANDI FILMUR




Frumsýning Fríggjadagin 26.11.